## Fiskivinnuavtala við russar ein vanlukka




Sambært Hans Andreasi Joensen er avtalan, sum føroyingar hava skrivað undir við russar um umbýti millum tosk og svartkjaft, er ein vanlukka fyri Føroyar. Hans Andreas Joensen, stjóri á Thor. Hann sigur eisini, at føroyska samráðingarnevndin hevur latið seg misinformerað av okkara egnu, og tí eigur avtalan at takast aftur beinanvegin. Hann leggur afturat, at vit við hesi avtaluni hava mist millum 200 og 300 mill. kr. í virði. –Tað eigur at fáa avleiðingar fyri tey, sum hava gjørt avtaluna og fara vit at kanna allar smálutir í henni og krevja, at avtalan verður afturtikin metir Hans Andreas Joensen.

## Jólasvimjing hjá ÍSB

ÍSB skipar sunnudagin 30. november fyri svimjikapping í Klaksvík. 16 kappingar vera á skránni, men í kappingum, har bert ein ella tvær tilmeldingar eru, verður kappingin lagt saman, so bæði kynini kappast. Tó verður kappingin avlýst, um bert tveir luttakarar eru tilsamans. Øll við serligum tørvi kunnu luttaka, og tekningarfreistin er innan hósdagin. Sjálv kappingin byrjar klokkan 13, men upphitingin byrjar klokkan 12. Tey, ið hava tørv á hjálpara til umklæðingarrúmið mugu hava hjálpara við sjálvi.

# Upplivað 25 ferðsludráp og




Regin Jespersen hevur stóran áhuga fyri bjargingararbeiði, og tí hevur hann í nøkur ár eisini verið formaður í Landsfelag Bjargingarmanna
Mynd: Jens Kr. Vang

**- Eg havi tíbetur havt evnini at »gloyma« tær keðiligu løturnar, samstundis sum tær góðu løturnar sita eftir. Sjálvandi gloymir tú ongantíð tær hendingar og vanlukkur, sum tú hevur upplivað gjøgnum árini, men tú noyðist at ansa eftir, at hesar ikki fjala útyvir tær góðu løturnar í starvinum, sigur Regin Jespersen, ið nú gevst sum sýslumaður í Vágum**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Maðurin er føddur í býarpartinum Frederiksberg í Keypmannahavn uppundir endan av seinna heimsbardaga.

Foreldrini vóru tvørámaðurin, Sølvi Jespersen, sum doyði í 1996 og mamman Ingrid Jespersen, fødd Samuelsen, ættað av Hellunum. Hon doyði í 1999. Bæði vóru fødd saman ár - í 1918.

Nú er maðurin, vit tosa um, 63 ára gamal, pensjóneraður og er í holt við at pakka sýsluskrivstovuna í Sørvági.

- Eg plagi at siga, at eg eri hálvur suðuroyingur og hálvur norðoyingur. Foreldrini komu saman undir krígnum, og í 1945 varð eg so føddur. Tey sluppu ikki heim, men tá kríggið var av, fluttu vit til Vágs at búgva. Har búðu vit til 1969, meðan pápi starvaðist sum telegrafistur á Loranstøðini í Vági. Tá pápi fekk starv sum varaleiðari á Loranstøðini á Eiði, sum tá var nýggj, fluttu vit norður hagar at búgva.

Áðrenn vit fara til søguna um Regin Jespersen sjálvan, hevur hann hug at siga um pápa sín, at hann er tann maðurin, sum hevur verið longst í starvi sum innan Loran C í øllum heiminum.

- Pápi fekk medalju frá US Coastgard fyri sína trúgvu tænastu, sum byrjaði í 1946 og endaði miðskeiðis í áttatiárunum, leggur hann aftrat.

### Við skúlaskipi

Regin sigur, at tá tey fluttu til Eiðis at búgva, fór hann sum 13-14 ára gamal til Havnar í millumskúla, sum tað tá varð rópt. Hann ásannar, at her kom lítið burtur úr, tí hann tímdi ikki at ganga í skúla í Havn.

- Tey næstu 2-3 árini búði eg aftur á Eiði hjá foreldrum mínum. Hesi árini fekst eg eitt nú við vegaarbeiði, har vit arbeiddu upp á vegirnar til Gjáar og Funnings.

Í 1963 fór Regin við skúlaskipinum George Stage, og her var hann í seks mánaðir.

- Ætlan mín var tá at fara tann vegin, og eg hevði fingið kjans sum aspirantur við DFDS. Eg var einabarn, og eg haldi, at foreldur míni helst vildu hava meg heimaftur. Nú fór eg at arbeiða á Loranstøðini, har pápi var varaleiðari, og her var eg í einar 13 mánaðir, sigur hann.

### Angrar ikki

Vit spurdu eisini Regin, um hann nakrantíð hevur angrað, at hann ikki valdi sjógvin fram um arbeiði á landi.

- Nei, tað vil eg ikki siga. Eg havi altíð havt hug til sjógvin. Áðrenn eg fór umborð á George Stage, var eg í tríggjar vikur við sluppini Pilot úr Fuglafirði. Eg var deyður av sjóverki allar hesar dagarnar, eg var umborð. Mær hevur seinni eisini dámað væl at siglt við sluppunum, Jóhonnu og Westward Ho, tá høvið beyðst. Haraftrat havi eg bát saman við vinmanni, og um summarið sigla vit við ferðafólki, eitt nú til Mykinesar, Tindhólm og kring vágabjørgini.

Í fyrraári var Regin eisini við til at sigla ein seglbát heim úr Grønlandi. Hetta var ein bátur, sum Edvard Niclasen hevði keypt. Báturin, sum er einar 44-44 føtur til longdar, var komin úr Ný Sælandi.

- Vit komu í illveður á Kappanum og lógu í hesum illveðri í eini trý samdøgur. Eg visti, at báturin toldi hetta veðrið, og tí var eingin ótti umborð. Vit vóru fýra mans við bátinum á ferðini heim til Føroya, sum vardi í eini 10-12 samdøgur.

### Radiomekankari

Vit venda nú aftur til tíðina, tá Regin var ungur og byrjaði at hugsa um at velja sær eina lívsleið.

- Í 1965 fór eg at læra radiomekanikara í Radiobúðini í Saltangará. Hetta var ein sera góð tíð í mínum lívi. Vit vóru seks vikur í skúla í Havn, og millum lærararnar var eitt nú Olivur Næs.

Regin sigur, at Radiobúðin var eitt deiligt læruplláss, og hann búði eisini so serstakliga væl hjá Anni og Valdemar Midjord uttarlaga í Runavíkini.

- Eg leigaði eitt kamar

> *- Eg havi tíbetur havt evnini at »gloyma« tær keðiligu løturnar, samstundis sum tær góðu løturnar sita eftir.*
> *(Regin Jespersen)*